# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI ALMENNAN STOVN VIÐ KVÍGGJARTÚN, MATR. NR. 56A, ARGIR

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali 1, partur av matr. nr. 56a Argir og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## §2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa bygging av almennum stovni á økinum.

Stk. 2. Økið er uml. 7600 $m^2$ til støddar og liggur í einum C3 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til miðstaendamál, skúlar, almennar stovnar og íbúðir.

Stk. 5. Vegir, felagsøkir og gøtur skulu gerast sum sýnt er á viðhefta kortskjali 2.

Stk. 7. Sambært kap. IV, §22, stk. 2 skal útstykking og bygging í C3 øki gerast sambært serstakari byggisamtykt fyri alt økið ella ein natúrliga avmarkaðan part av tí.

Stk. 8. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3. NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið, sum byggisamtyktin regulerar, skal nýtast til almennan stovn.

## §4. VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegir og parkering skulu gerast sambært ásetingunum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

## §5. BYGGING OG STØDD HÚSANNA

Stk. 2. Byggistigið má í mesta lagi verða 0,4.

Stk. 3. Nýtslustigið má í mesta lagi verða 0,8.

Stk. 4. Mest loyvda hædd av bygningi er 9 m frá planering.

Stk. 5. Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu verða í samsvar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

## §6. ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §7. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggingarmyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI.

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| HEILSU -OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 19/00567 |
| Ætlanarskriv: | 23/9 - 2019 |
| Góðkent: | 24/9 - 2019 |
| Váttað: | [signature] |



**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Sersøk byggisamtykt fyri almennan stovn við Kvíggjartún | | | | |
| **Undirheiti** | Kort 1 | | | | |
| **Mát** | 1:3000 | | | | |
| **Dagur** | 23.09.2019 | **Journal** | 19/00769 | **Tekna** | RVH |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Sersøk byggisamtykt fyri almennan stovn við Kvíggjartún | | | | |
| **Undirheiti** | Kort 2 | | | | |
| **Mát** | 1:1000 | | | | |
| **Dagur** | 23.09.2019 | **Journal** | 19/00769 | **Tekna** | BM |

VINNU- OG UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

24. september 2019
**Mál:** 19/00567-8
**Tygara Skriv:**
**Viðgjørt:** KHP

**Serstøk byggisamtykt við Kvíggjartún, Argir**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Tórshavnar kommuna við skrivi, dagfestum 19. juni 2019, sent Heilsu- og innlendismálaráðnum t.e Vinnu- og umhvørvismálaráðnum uppskot til serstaka byggisamtykt við Kvíggjartún, matr. nr. 56a, Argir til góðkenningar.

Uppskotið snýr seg um at skipa økið í sambandi við ætlanir um at byggja almennan stovn til børn og ung við autismu í økinum. Økið liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og skal øll bygging og útstykking gerast sambært serstakari byggisamtykt..

Broytingin hevur ligið alment frammi frá 2. mai til 13. juni 2019. Tá freistin at koma við møguligum broytingaruppskoti ella mótmæli var farin, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og mælir í ummæli sínum, dagfestum 11. september 2019, til, at serstaka byggisamtyktin við Kvíggjartún, matr. nr. 56a, Argir verður góðkend.

Vinnu- og umhvørvismálaráðið tekur undir við ummælinum frá Býarskipanarnevndini.

Sagt verður frá, at Vinnu- og umhvørvismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir serstøku byggisamtyktina við Kvíggjartún, matr. nr. 56a, Argir.

Mint verður á, at hóast ráðið nú hevur góðkent serstøku byggisamtyktina við Kvíggjartún eftir reglunum í býarskipanarlógini, so sleppur kommunan ikki undan at fáa til vega møguliga aðrar góðkenningar frá øðrum myndugleikum. Víst verður til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.

Hjálagt serstaka byggisamtyktin við Kvíggjartún við átekning frá Vinnu- og umhvørvismálaráðnum.

Vegna Vinnu- og umhvørvismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo